## Broytt byggisamtykt fyri Sund

Á býráðsfundi í Havn hóskvøldið, varð byggisamtyktin fyri økið norðan fyri elverkið á Sundi broytt. Økið, talan er um, hevur í umráðispartinum B9, ið verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur. Umframt hetta verður økið tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum. Eftir tilmæli frá býararkitektinum er økið broyt til E umráði. Hetta merkir, at umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.d. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg. Hetta svarar somuleiðis til tænastuvirksemi og bilstøðlar, sum hava samband við hesi. Tilmælið frá býararkitektinum var fyri á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini tann 10. oktober. Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið á býráðsfund. Og á býráðsfundinum hóskvøldið varð málið einmælt samtykt.

## Danmark dumpar í tubbaksfyribyrging

Hóast tær nýggju roykireglurnar liggur Danmark illa fyri, tá talan er um at fyribyrgja royking. Danmark er á sama støði sum Litauen, Ungarn, Polen og Letland. Danmark fær nevniliga dumpi-karakter fyri arbeiði teirra og tað hjá 30 øðrum londum. Danir liggja á einum 20. plássi. - Hetta er eitt keðiligt úrslit, siga umboð fyri danska Kræftens Bekæmpelse. Roykireglurnar eru ikki nóg góðar. Kanningin metir um tey einstøku londini út frá prísinum á tubbaki, lóggávuni um roykfrí umhvørvi, almennar útreiðslur til tubbaksfyribyrging og hjálp hjá fólki at leggja av at roykja. Stórabretland er ovast á listanum, og beint í hølunum á teimum eru Írland, Ísland og Noreg. Niðast á listanum eru Týskland, Eysturríki og Grikkaland.

# Reinsiverk fyri hundrað milliónir

**Býráðið í Havn hevur endaliga samtykt at byggja nýtt reinsiverk í Havnardali fyri at drýggja um vatnið í Villingardalsbrunninum. Hetta, saman við øðrum reinsiverkum, eru arbeiði, sum borgarstjórin væntar fer at kosta eitt stað millum 80 og 100 milliónir**

REINSIVERK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nýtt reinsiverk skal byggjast til vatngoymsluna í Havnardali*

Tað var longu í 2004, at fyrireikingar byrjaðu til at byggja nýtt reinsiverk í Havnardali. Orsøkin var, at býurin alsamt veksur, og fyri at drýggja vatnið í Villingardalsbrunninum, er ynski frá teknisku nevnd at fáa nýtt og størri reinsiverk úti í Havnardali.

Í juni sama árið játtaði fíggjarnevndin 365.000 krónur til forkanningar og gerð av byggiskrá, og ein internurarbeiðsbólkurkannaði málið.

Í 2005 vórðu síðani settar 400.000 krónur av til at gera dispositiónsprojekt og forprojekt fyri. Seinni um heystið varð so møguleiki kannaður fyri at flyta nýggja verkið longur heim frá sjálvari byrgingini enn mælt varð til, og at kanna møguleikan fyri at fáa meiri vatn í byrgingina í Villingardali.

Hetta varð tó mett at verða ógvuliga kostnaðarmikið. Líknandi vatnverk sum tað í Villigardali, nýggjari kloakk og nýggjari vatnleiðing heim á Norðasta Horn er mett at kosta 57,5 milliónir krónur.

Annars hevði eitt danskt felag givið tilboð upp á eitt alternativt reinsiverk, sum í stuttum snýr seg um ein nýggjan reinsihátt, ið enn er á menningarstøði. Talan er um membranfiltur, sum vatnið verður trýst ígjøgnum. Hesi membranfiltur eru so tøtt, at sjálvt bakteriur sleppa ikki ígjøgnum.

Fyrimunirnir við hesum reinsiverkinum er, at tað er minni í vavi og kostar minni. Vansarnir eru, at tøknin er so nýggj og harvið óroynd, og eisini er viðlíkahaldið munandi dýrari enn við traditionellu skipanini.

**Tvey uppskot**

Havandi í huga góðu royndirnar av vatnverkinum í Villingardali og óvissuna við membranverkinum varð gjørt av at fara víðari við upprunaliga uppskotinum um vatnreinsiverk.

Ivi stóðst tó av, hvar reinsiverkið skuldi plaserast. Eitt uppskot var at seta reinsiverkið í eini passandi fjarstøðu frá sjálvari byrgingini, og hitt hundrað metrar longur heima. Samtykt varð, at kanna bæði uppskotini. Býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildini mæla til at taka undir við fyrra uppskotinum.

Hetta merkti, at neyðugt var við serligum byggiloyvi og at friðingarmyndugleika rnir.

Drúgvar kanningar vórðu síðani gjørdar og komið var fram til, at lítil og eingin prísmunur var á uppskotunum báðum. Býararkitekturin og leiðarin fyri vatndeildina mæltu tó til uppskot tvey, og hetta gjørdist at enda tað, ið samtykt varð av býráðnum.

Á býráðsfundi hóskvøldið samtykti býráðið so at játta fýra milliónir krónur til projektering av ætlanini av gera nýtt reinsiverk í Havnardali.

# Smíl til verðina…

**Tú kanst fáa eitt smíl allastaðni frá, eisini har tú minst væntar tað**

SMILEY
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru tey ótrúligastu støðini, tú kanst møta einum smíli. Men meiri óvæntað tað er, gleðiligari er tað. Tað máttu tey sanna í Býlingshúsinum vesturi á Flat.

Tá tey skuldu hava kalt borð í Lundastovuni fyri teimum 14 børnunum, sum har eru, skuldu børnini hjálpa til við at skera sundur frukt og grønmeti. Knappliga misti eitt av starvsfólkunum eina hálva piparfrukt á gólvið, og tá hon tók hana upp aftur fekk hon eitt rættiliga óvæntað smíl.

Piparfruktin er nevniliga ein útskorin mynd av einum »smiley«. Ógvuliga stuttligt, tí tað vísir, at tú kanst fáa eitt smíl við á vegnum, eisini frá mest óvæntaðu kantum.



*Hendan piparfruktin er ein flottur smiley*